**Viðareiðis skúli**
FO-750 Viðareiði
Tlf. 588052 · Teldupostur: vid@skulin.fo

# Lærarastarv í Viðareiðis Skúla

**Skúlaárið 2006/2007 er eitt tíðaravmarkað starv vegna avlopstímar leyst at søkja.**

Undirvísingartímatalið er umleið 16 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastsett í september.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar skal taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- er við í arbeiðinum áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærara, ið kann átaka sær at undirvísa í :**
- føroyskum í 2. og 3. flokki
- ítrótti í 1. og 2. flokki
- næmingi við serligum tørvi

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 4. august kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jensebeth Absalonsen, skúlaleiðara á tlf. 58 80 52.

# Sethús við Sjagagarð í Vági



Plastklædningur/vindeygu og hurðar. Byggiøki 106 kvm. Byggiár uml. 1960.

Til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 573006 ella 373006**

# Móttøka av ull í Vági, Kollafirði og Klaksvík

**SIRRI** tekur ímóti ull
í Vági frá 24. juli til 12. august
**á Búnaðardeplinum í Kollafirði**
frá 1. august til 12. august
mánadag – fríggjadag kl. 13.00 – 18.00
leygardag kl. 10.00 – 14.00

Fyri ull, ið er turr og væl hagreidd, verður latið 8,00 kr. fyri kilo í býti við vørur, og 4,00 kr. fyri kilo við útgjald. Býtisseðilin skal nýtast innan 31. desember 2006.
Umframt fær innlatarin 4,00 kr fyri kilo í stuðulsískoytið, sum verður flutt gjøgnum Gjaldstovuna á upplýsta konto í peningastovnunum.
Ullin skal latast í sekkir umleið 10 kilo í hvønn, og eigaranavn skal skrivast á.

SIRRI í Vági, tlf. 374006 og 224006

Spunavirkið **FILANA** tekur ímóti ull
**í Klaksvík á gamla Dávavirkinum**
frá 15. juli til 19. august
leygardagar kl. 13.00 – 18.00
ella eftir avtalu, ring tlf. 458500

Prísur, íroknað stuðulsískoyti, fyri kilo: 1. flokk - 10,00 kr. 2. flokk - 6,00 kr. 3. flokk - 4,00 kr.
Ognarseðil verður latin við innvigingina og avroknað ígjøgnum peningastovn 4 vikur seinni.

Spunavirkið FILANA, tlf. 458500

Tann parturin av ullini, sum ikki kann gagnnýtast, skal vera skildur frá og beindur burtur á staðnum ella á rættini á forsvarligan hátt.
Gjørt verður vart við, at ullamóttøkan skilar sær rætt til at geva lægri ella ongan prís fyri ull, sum ikki kann gagnnýtast, t.v.s ull við skarni, sandi mosa o.ø. í.

Flutningstuðul, á 2,00 kr fyri kilo, verður latin til innlatarar sum nýta bát ella undirsjóvartunnil fyri at koma til ullamóttøkurnar.

**Royndarstøðin**
(Stuðulsumsitari)
410 Kollafjørður

Nýtt múraravirki

**Vit átaka okkum alt múraraarbeiði...**

sp/f MÚRARAVIRKIÐ
RDC
tel 59 20 30



## Kunngerð

**Serstaka byggisamtykt nr. 3**

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 29. juni 2006 samtykti broytingar í serstøku byggisamtykt nr. 3 og aAlmennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at matr. nr. 735, við Traðabrekku, Tórshavn, verður broytt frá D1 fríøki til A1 sethúsaøki.

Eisini er ætlanin at broyta serstøku byggisamtykt nr. 3 samsvarandi, fyri matr. nr. 735, frá C1 øki til alment endamál til A sethúsaøki.

Harafturat er ætlanin at broyta serstøku byggisamtyktina 3 fyri matr. nr. 733b, 736a, 723a, 734a og part av 731, Tórshavn, fyri at fáa samsvar við almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, frá C1 øki (almenn endamál við loyvi til bygging av einstøkum almennum stovnum) til C2 øki (almenningur har ikki er loyvt at byggja).

Tilfar sum ætlaðu broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 24. juli til og við 14. august 2006, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga áðrenn 24. oktober 2006.

Tórshavnar kommuna

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*HEIMARØKTIN*

# Ítrivsvegleiðari

## til Eldrasambýlið í Vestmanna

Eitt starv sum ítrivsvegleiðari á setanarbrøki 0,5 í tíðarskeiðnum 1. september 2006 til 31. desember 2006 er leyst at søkja.

Arbeiðstíðin er dagtímar mánadag til fríggjadag.

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving sum ítrivsvegleiðari, ergoterapeautur ella heilsurøktari.
- Hevur hug og hegni at starvast við eldri fólki og at samstarva við ymiskar fakbólkar
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og tilrættaleggja dagin í mun til tørvin hjá tí einstaka brúkaranum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fæst við at venda sær til økisleiðaran á telefon 333249 og 282249. Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. verður at senda til:

**Heimarøktin Vágar/Norðstreym**
Økisskrivstovan
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 4. august 2006**